# Hvat er endamálið harra Kári Mikkelsen?

JÓGVAN SUNDSTEIN



Havi lagt til merkis, at eitt nýtt navn av á stingur seg upp sum skrivandi partur av Sosialinum. Hesin nýggi maðurin er helst eisini við í leiðsluni, tí eg haldi meg hava sæð, at hann eisini skrivar oddagreinir, tað vil siga, at hann umboðar hugburðin hjá Sosialinum til ymisk mál.

Í seinasta fríggjadagssosialinum hevur Kári Mikkelsen tvær greinir, sum eg kundi hugsa mær at gjørt nakrar viðmerkingar til. Tann fyrra ber heitið: Vestergaard verið dýrur drongur. Viðmerkingin hjá Mikkelsen snýr seg um tvær avgerðir hjá Jacob Vestergaard, onnur í samband við loyvi hjá Jógvani S, sum varð afturtikið meðan Jacob Vestergaard var fiskimálaráðharri, og hin um skiparnar á Smyrli, nú Vestergaard var innlendismálaráðharri. Lat okkum taka Jógva S málið fyrst.

**Jógvan S málið**

Tað má væl altíð vera so, at ein professionellur fjølmiðlaviðmerkjari lýsir eitt mál, í øllum førum nøkulunda, til fullnar, og serliga tá viðmerkingin beinleiðis er ætlað sum álop – fyri ikki at siga útspilling – av einum persóni. Mikkelsen skrivar bert, at afturtøkan af veiðiloyvinum kostaði landskassanum 2,4 mió. kr. sambart rættaravgerð. Ikki eitt orð um, hvat annars var hent í hesum málinum. Tað er einki at ivast í, at rættaravgerðin var røtt, men hvat lá aftanfyri avgerðina hjá Jacob Vestergaard. Jú sum landsstýrismaður noyðist hann, eins og ein og hvør annar landsstýrismaður, at lurta eftir løgtingsins vilja. Málið um Jógvan S var komið í landsstýrismálanevndina, og hendan løgtingsnevndin kravdi, at loyvið varð afturtikið. Jacob Vestergaard kundi so velja, at halda fast um loyvið, og tað var, so vítt eg veit, hansara sjónarmið, og harvið endaði málið helst sum ein samtykt í Løgtinginum, sum so tvingaði hann til kortini at taka loyvið aftur. Hann valdi tí at fylgja landsstýrismálanevndini, sum umboðaði tann politiska viljan. Aftaná, tá rætturin hevur talað, kunnu vit síggja, at sjónarmiðið hjá Jacob Vestergaard var tað rætta, og at Løgtingsins vilji var skeivur. Men skal ein staðfesta ábyrgd í hesum máli, so má tað fyrst og fremst vera løgtingsnevndin og harvið Løgtingið, sum hevur ábyrgdina av hesum mistaki og harvið óneyðugu útreiðsluni.

**Skiparnir á Smyrli**

Eg havi longu skrivað eina grein, sum hevði eina hálva viku um at koma í Sosialin, um hetta málið.

Niðurstøðan í hesum máli er, at tað ikki vóru Vestergaard og innlendismálaráðið, sum eiga ábyrgdina av gongdini, men fyrst og fremst fíggjarmálaráðið og partvís fráfarni strandferðslustjórin. Tá skrivið um at broyta fráfaringaraldurin kom, og aktuellir persónar ikki vóru farnir úr starvi og heldur ikki vóru fylltir 67 ár, hava teir vanligan juridiskan rætt at halda fram í starvinum. Hetta átti strandferðslustjórin at handla eftir, og fíggjarmálaráðið hevði skyldu til at geva hetta loyvi. Og tá hetta ráðið gjørdi mistakið við at nokta, er púra greitt at málið mátti klagast. Strandferðslustjórin gjørdi eisini eitt stórt mistak við ikki at halda seg til sín egna myndugleika, nevniliga innlendismálaráðið. At so løgmaður eisini misti nervarnar og segði innlendismálaráðharran úr starvi vísir bara, hvussu jánkasliga málið varð viðgjørt. Niðurstøðan hjá Kára Mikkelsen um, at Vestergaard hevur ábyrgdina av 2,5 mió. í eyka útreiðslum av hesum málinum er tí beinleiðis skeiv. Tvørturímóti ætlaði hann at loysa málið á rættan hátt. Ábyrgdina hevur fyrst og fremst fíggjarmálaráðið og síðani løgmaður.

**Sandoyartunnillin**

Hin greinin hjá Kára Mikkelsen í fríggjadagsblaðnum ber heitið: Heimsins longsta og dýrasta jólagáva. Her ger Mikkelsen gjøldur burtur úr samtyktini um at gera tunnillin undir Skopunarfjørð. Maðurin fær seg til at seta eitt roknistykki upp, sum sigur, ar hvør borgari í restini av landinum rindar kr. 16.500 til teir 1.500 borgarnar í Sandoynni, og at hvør borgari í Sandoynni fær eina hálva millión sum jólagávu frá restini av landsins borgarum. Maka til niðurgering av parti av landsins íbúgvum havi eg ikki sæð. Tað ljóðar sum sandoyafólk eru "second class", og sum at hesi ikki eisini eru við at halda føroyska samfelagnum gangandi. Kári Mikkelsen hevði egnað seg væl sum framsøgumaður í bólki ella flokki við rasistiskum sjónarmiðum. Nei mín góði harra Mikkelsen, tað er at fegnast um, at hóast alt vóru 24 tinglimir, sum sóu, at allir føroyingar hava somu rættindi, og at eisin Sandoyggin eigur at fáa lut í landsins samlaðu drívmegi. Sandoyingar luttaka frammanundan í rakstrinum av føroyska samfelagnum, eisini tí sum fellir niður í vaksandi miðstaðarøkinum, og tá teir nú koma uppí hetta øki verður lutur teirra upp aftur størri. Nei tann "gávan", sum føroyingar við hesum geva Sandoyarfólki, er so avgjørt hjálp til sjálvhjálp. Føroya land fær nógv meira aftur sum frá líður, enn tann íløgukostnað, sum næstu 5 árini verður lagdur í hetta projektið. Kostnaðurin verður goldin yvir nøkur lutfallsliga fá ár. Nyttan er varandi í mong ár framyvir.

Um vit skulu vera í jólagávutermonologiini, so kunnu vit kanska líknað "tunnilsgávuna" við, at maðurin gevur konuni eina vaskimaskinu í jólagávu. Hetta er gott nokk ein stór gáva, men hon er ikki bert til nyttu fyri konuna, men í minst líka stóran mun fyri mannin sjálvan og alt húsarhaldið

Hugburðurin í greinini hjá Kára Mikkelsen er tann sami, sum kom fram í mótstøðuni móti fyrstu tunnilsbyggingunum í Suðuroynni og í Norðoyggjum, sum eisini vísti seg á sinni móti keypinum av "Molsinum" og sjálvt tá Vágatunnillin skuldi gerast var mótstøðan stór. Hetta bert fyri at taka nøkur dømi. Men Føroyar høvdu ikki verið til helvtar framkomnar og vælferðin ikki nærtil verið tann, hon er í dag, um ikki hesar og mangar aðrar íløguætlanir vóru framdar. Nógv er gjørt á Føroya landi gjøgnum tíðina, men nógv er eisini eftir. Framburður verður skaptur av framskygdum og vælmeinandi fólki, ikki av slíkum, sum ikki unna sínum meðmenniskjum nakað og ikki kenna til tað samhaldsfesti, sum eigur at vera millum allar landsmenn.

**Aftursvar:**

# Kennir tú teg raktan, harra Jógvan Sundstein?

KÁRI MIKKELSEN
redaktiónsleiðari



At tú sum fyrrverandi løgmaður, landsstýrismaður og ein mansaldur sum løgtingsmaður ikki klárar eitt sindur av speisemi í viðmerking míni fríggjadagin um Sandoyartunnilin, ja, tað skilji eg ómetaliga væl. Tí um nakar, so stendur júst tú sum ein av eksponentunum fyri tann politiska ørskap, ið fór fram í áttatiárunum, og sum var beinleiðis orsøkin til tað fallitbúgv, ið onnur máttu taka upp eftir tykkum í nítiárunum. Ein kreppa vit føroyingar framvegis dragast við. Um ikki beinleiðis fíggjarliga, so sum sár í stoltleikanum hjá eini tjóð, ið mátti til Danmarkar við hattinum í hondini.

Fyri at taka Jacob Vestergaard fyrst, so er tað sjálvandi í fínasta lagi, at tú verjir floksfelagan, tí valla er tað hansara feilur aleina, at tað gekk, sum tað gjørdi við Jógvani S. Tó skerst ikki burtur, at tað var hann, ið tók fiskiloyvið aftur, og at hetta í fyrstu atløgu kostaði 2,4 mió. krónur í endurgjaldi. Eitt mál, sum kann koma at kosta uppaftur meiri, tí tað er kært til Landsrættin. Eg ivist onga løtu í, at Jacob Vestergaard hevur spurt onkran av sínum floksfeløgum og fingið "góð ráð", áðrenn hann tók avgerðina. Politisk uppíleggjing í almenna fyrisiting er alt annað enn eitt fremmant fyribrigdi her á landi, tíansheldur í tínum flokki.

Og at tað var landsstýrismaðurin, ið hevði ábyrgdina av skiparamálinum á Smyrli, ivast sjálvt fólkafloksmenn ikki í. Annars høvdu teir mótmælt avgerðini hjá løgmanni um at koyra hann frá.

At eg hevði egnað meg sum framsøgumaður í einum flokki við rasistiskum sjónarmiðum eru grovar skuldsetingar frá tær, sum eg ongantíð fyrr havi verið útsettur fyri. Hetta, tí eg loyvi mær at seta spurnartekin við raðfestingina av eini íløgu upp á 750 mió. krónur til eitt øki, sum hevur gott samband við meginøkið í dag.

Og at ein fyrrverandi formaður í júst Fólkaflokkinum skal skuldseta onnur fyri rasistisk sjónarmið, man vera torført hjá nøkrum føroyingi, ið minnist eitt sindur aftur í tíðina, at taka fyri fult. Í formanstíðini hjá tær hevði Fólkaflokkurin eitt málgagn – Dagblaðið kallaðist tað vist – hvørs fremsta endamál var at útspilla, undirgrava og niðurgera politisk mótstøðufólk. Tað man vera tað nærmasta, vit nakrantíð hava verið fasistiskum og rasistiskum fjølmiðlavirksemi í Føroyum. Eitt fyribrigdi, sum vit vónandi ongantíð aftur fara at uppliva. At sama málgagn hevði sum eitt av sínum hjartamálum at verja apartheidstýrið í Suðurafrika, hevur tú eftir øllum at døma eisini gloymt; ella bara fortrongt. Og ikki minst fasistiska hernaðarstýrið hjá Augusto Pinochet í Kile, ið fyrst framdi statskvett og drap demokratiskt valda forsetan, Salvador Allende, og síðani píndi og drap túsundtals, politisk mótstøðufólk. Stýrini í hesum báðum londunum vóru stóru fyrimyndirnar hjá teimum, ið skrivaðu málgagnið hjá tínum flokki. Sum kunnugt hevur tað ongantíð verið hildið at vera serliga skilagott at blaka við steinum, tá man býr í glashúsi – ella rættari – hevur gjørt tað.

Fyri at venda aftur til tað, sum tú finst at í míni viðmerking, so havi eg ongastaðni skrivað, at sandoyingar ikki skulu hava teirra undirsjóvartunnil. Eg skilji eisini ótrúliga væl, at teir vilja hava fast samband, og hetta skal vera teimum vælunt. Ongin ivi er um, at tunnilin undir Skopunarfirði fer at koma øllum føroyska samfelagnum til góðar. Bert havi eg loyvt mær tann demokratiska rætt at seta hetta í perspektiv í mun til aðrar almennar íløgur, har skorið verður inn á bein.

Eitt dømi, sum eg ikki nevndi í viðmerking míni í blaðnum fríggjadagin, var, at KRIS – ein sjálvboðin felagsskapur, ið hjálpir insestofrum – sum fær 200.000 krónur um árið, men í veruleikanum átti at fingið nógv meiri, er í vanda fyri heilt at verða tveittur av fíggjarlógini. Kann nakar uttanfyri Tinghúsið skilja, at samstundis sum ein stórur meiriluti av løgtingslimum taka avgerð um at gera eina íløgu upp á 750 mió. krónur við vinstru hond, siga somu politikarar nei til 200 túsund krónur til eitt sera vælgerandi endamál við høgru hond. Hetta er so langt úti, at torført er at finna orð fyri tí. Ikki eingong so tætt uppundir eitt løgtingsval, er tað til at skilja, at slíkt kann koma fyri. At meirilutin er so stórur, har bert tvær atkvøður eru ímóti og tvær blankar, kann einans skiljast soleiðis, at politikkur ikki bara byggir á vanligt vit og skil, men líka so nógv á rossahandlar. - Fáa vit hetta ígjøgnum, so skulu tit fáa hatta ígjøgnum osfr.

Eitt annað mál er um Ítróttarsambandið fyri Brekað, ÍSB, sum í fyrstu atløgu hevur fingið nei til 100.000 krónur á fíggjarlógini, ið felagsskapurin skal brúka til at skipa fyri eini ráðstevnu millum norðurlond, sum tey fyri langari tíð síðani hava sagt ja til. Nú má ÍSB møguliga líða tann tort at skula aftur til hini londini og siga, at tey hava ikki ráð og mugu avlýsa ráðstevnuna, tí føroysku myndugleikarnir ikki vilja stuðla hesum. Peningurin skal brúkast til at seta eitt hálvtíðarstarv at samskipa tiltakið. Sjálvt um ÍSB setti seg í samband við Mentamálaráðið, áðrenn tey átóku sær at skipa fyri ráðstevnuni, og sama Mentamálaráð lovaði at gera alt fyri at fáa játta peninginin, stendur ikki eitt oyra á fíggjarlógaruppskotinum.

Hyggja vit so eftir, hvat Sandoyartunnilin kostar, tá hann einaferð er afturgoldin, gerst myndin ikki minni grotesk. Við rentum og rentum av rentum fer íløgan ivaleyst tátta í tað tvífalda, t.e. smár 1,4 mia. krónur, tá skuldin er burtur. Og at blíva við at samanbera hesa íløguna við Vágatunnilin og Norðoyatunnilin, sum tú og nógvir aðrir politikarar gera – harímillum núverandi løgmaður – er politisk villeiðing. Tær báðar fyrru íløgurnar gjalda seg sjálvar aftur, men tað ger Sandoyartunnilin ógvuliga langt frá.

Stjórin í Norðoyatunlinum, Dávur Reinert Hansen, segði so seint sum fríggjadagin við Rás 2, at tunnilsgjaldið í Sandoyartunlinum við teimum mettu ferðslutølunum í mesta lagi kann forrenta 80 mió. krónur. Treytin fyri at koma upp á metta talið, er enntá, at allir suðuroyingar brúka hesa farleið. Hetta merkir, at landskassin, og harvið føroyski skattgjaldarin, má gjalda restina av teimum mongu hundrað milliónunum.

Men, Jógvan Sundstein, fyri at venda aftur til tað, sum eg byrjaði við at staðfesta: Tú hevur ivaleyst torført við at síggja skógin fyri berum trøðum, tá man hugsar um politiska og fíggjarliga ørskapin, sum valdaði í tíni tíð sum politikari og floksformaður. So tá alt kemur til alt, ert tú helst lógliga umskyltur.